FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# LÝSING EFTIR DAGRØKTARUM

Søkt verður eftir dagrøktarum til kommunalu dagrøktina í Fuglafjarðar kommunu at byrja tann 16. februar 2009.

Í dagrøktini í Fuglafirði arbeiða 8 dagrøktarar.

Spælistova er knýtt at dagrøktini. Í dagrøktini ganga 40 børn, í aldrinum 0 – 6 ár.

Størvini talan er um, eru tíðaravmarkaði fram til summarferiuna 2009.

Ein treyt fyri at søkja størvini er, at dagrøktarheimið skal verða barnavinarligt innrættað, har rúm er til børnini at spæla, og at eitt hóskandi trygt spæliøki er uttanfyri.

**Vit vænta at tú:**
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- hevur hug at skapa ein tryggan og mennandi gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya fyri dagrøktarar.

Nærri upplýsningar um størvini fáast við at ringja til Eyðgerð A. Petersen, dagrøktarleiðara á telefon 73 77 94.

Møguligar umsókinir, ið skulu verða skrivligar, skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi leygardagin tann 07. februar 2009.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.



# Skrivstovuhølir til leigu

Góð og ljós skrivstovuhølir til leigu á Hjalla.

Atgongd til køk við øllum vanligum hentleikum og WC við bað.

**Tel. 21 73 00**



# Umboðsmannaval

í Sjúkrakassanum Fyri Skála Læknadømi verður tann 9. mars 2009.

3 umboð fyri Sjóvar kommunu standa fyri vali.

Uppskot við minst 6 valevnum skulu vera sjúkrakassanum í hendi innan 25. februar 2009.

**Sjúkrakassi Skála Læknadømis**
490 Strendur - Telefon 449 212 Telefaks 449 232



Barnatænastan

# HEILSUFRØÐINGUR

Barnatænastan søkir eftir heilsufrøðingi. Talan er um eitt fulltíðarstarv, sum fyrst og fremst fevnir um Norðoyggjar. Starvið verður at seta skjótast tilber.

Arbeiðið er samansett virksemi, við tænastu til barnafamiljur og skúlar í økjunum. Stórur dentur verður lagdur á tvørfakligt samstarv.

**Vit kunnu bjóða:**
Sjálvstøðugt og spennandi arbeiði, og til tíðir krevjandi.

Fakliga menning og supervisión.

At verða partur av einum samstarvstoymi við positivum og eldhugaðum starvsfeløgum.

Væntast kunnu broytingar í mun til raðfestingar og mannagongdir í samband við menningarverkætlan.

**Førleikakrøv:**
Útbúgving sum heilsufrøðingur.

Tað er ein fyrimunur, at viðkomandi hevur royndir frá heilsufremjandi arbeiði á barna-/familjuøkinum.

Áhugi fyri fakligari menning. Arbeiðið er skipað í samstarvstoymir, og er tað tí ein fyritreyt, at viðkomandi hevur góð samstarvsevnir og kann viðvirka til at menna toymið.

**Lønar- og setanartreytir:**
Løn sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsókn skal sendast til:
Barnatænastan
Bókbindaragøta 8
Postboks 132
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 16. februar 2009, kl. 12.00

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Barnatænastuna tel. 360000.

Arbeiðið hjá heilsufrøðingum er m.a. at eygleiða og kanna barnið, at ráðgeva og vegleiða foreldrum viðvíkjandi barnsins sálarligu, sosialu og likamligu menning, foreldraleikluti og tilknýti. Á skúlunum er arbeiðið, umframt hetta, at geva regluligar funktiónskanningar, samtala við børn, hetta bæði persónligar, bólkasamrøður og undirvísing.

BARNATÆNASTAN • BÓKBINDARAGØTA 8
POSTBOKS 132 • 100 TÓRSHAVN • Tel 360000
FAX 360002 • BARNATAENASTAN@NAERVERK.FO



Bilur tín verður sum nýggjur

Vit gera smáskaðar, polera, bona og lakkforsegla bil tín við Nano Cover

Quick Repair
Á Hjalla · tlf. 21 33 23



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# NÁMSFRØÐINGUR SØKIST

**»Kambur« søkir námsfrøðing at byrja 16. februar 2009.**

Kambur bjóðar tilboð til 6 ára gomul og er eisini frítíðarskúli næmingum í fyri 1. og 2. flokki í Fuglafjarðar skúla.

Stovnurin hevur opið frá klokkan 07.30 til 17.15.

Vit sóknast eftir einum námsfrøðingi, ið hevur dirvið at seta dagsskránna, bæði fyri tey 6 ára gomlu og frítíðarskúlabørnini.

Vit vænta at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, ert ja-lig/ur, dugir at samstarva, tekur ábyrgd og dugir at seta tær mál.

Vit bjóða eitt spennandi starv, ið støðugt er í menning, har tú kanst verða við at mynda og seta tín dám á stovnin. "Kambur" liggur í einum náttúruríkum umhvørvið, har ið náttúran náttúrliga setur sín dám á gerandisdagin.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er 40 tímar um vikuna, við møguleika fyri niðursettari arbeiðstíð.

Starvið verður sett frá 16. februar 2009.

Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Lønarstig 11 – 18.

Um eingin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Skrivlig umsókn skal vera Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 6. februar 2009 kl. 12.

Fuglafjarðar kommuna
Norður í Gerði 10b
FO-530 Fuglafjørður

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jógvan Philbrow, leiðari, telefon 73 77 91.



# Bilur til sølu

Nissan Almera 2,2 Diesel
frá januar 2002



**Ring 284444**


Lesið Sosialin -so eru tit við!